gult cyan magenta svart



# Sjúkt slógv á Leirvíksvegnum

**Tað standa 17 tangar við laksaslógvi á gamla Leirvíksvegnum. Hetta eru leivdirnar av fiskinum, sum tikin varð, tá ILA sjúkan rakti alistøðina Alilaks í Fuglafirði seinasta vár, sum enn ikki eru burturbeindar**

UMHVØRVISMÁL
*Edvard Joensen*



*Leivdirnar av laksinum, sum raktur varð av ILA sjúkuni seinasta vár, standa framvegis í tangum á gamla Leirvíksvegnum og bíða eftir at verða brendar*

*Mynd: Edvard Joensen*

Vit hava onga ætlan fyri, hvussu vit í Føroyum skulu sleppa av við deyðan fisk, sum ikki kann seljast. Og er talan um sjúkan fisk, kann hann heldur ikki sendast av landinum at beinast burtur. Laksurin, sum varð tikin á Fuglafirði í mars mánað í fjør, er enn ikki endaliga burturbeindur, tí brennistøðin hjá IRF orkar ikki at brenna meira enn eitt tons um samdøgurði.

Í mars mánað í fjør varð ILA. sjúka staðfest í aliringum hjá Alilaksi í Fuglafirði, og boðini vóru at taka fiskin, sum sjúkur var, og forkoma honum. Gjørt varð eftir boðunum, men trupulleikin var bara, at ongastaðni var at koyra fiskin uttan til brennistøðina hjá IRF í Leirvík.

Men her var so ein annar trupulleiki, sum ikki er so lítil heldur. Fiskur er ikki tað besta brennievnið, og hesin aldi laksurin er kanska serliga ringur at brenna. Brennistøðin klárar ikki at brenna meira enn eitt tons um samdøgurði ella tá umstøður eru til tað.

Nú skjótt eitt ár er liðið, síðan fiskurin varð tikin, stendur framvegis knappliga helvtin eftir á gamla Leirvíksvegnum og bíðar eftir at sleppa í ovnin.

Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon í Kollafirði, sum eigur alistøðina Alilaks í Fuglafirði, sigur, at í teimum 17 tangunum, sum enn standa eftir, eru umleið 400 tons, meðan samlaða nøgdin, tikin var til burturbeiningar, lá um 1.000 tons.

Tað var einki minni enn ein vanlukka, sum rakti alistøðina. Tað kostaði felagnum einastaðni millum 17 og 20 milliónir krónur, Og enn er einki avgjørt, um nakað endurgjald yvirhøvur fæst fyri missin. Var talan um ein lítlan alara, spann ikki í honum eftir ein sovorðnan umgang, sigur Frímund Hansen.

Tað vóru 957.000 fiskar í ringunum, og av teimum kom bara ein fjórðingur til sættis.

Eitt er, sigur Frímund Hansen, at felagið missir alt tað, sum fiskurin skuldi verðið seldur fyri. Men teir skulu so saniliga eisini gjalda fyri at forkoma tí, sum ikki kann seljast, hóast tað er teimum álagt frá myndugleikunum.

Tað kostar Vestsalmon 770 krónur fyri rúmmeturin at brenna hetta slógvið. Umframt leiga teir tangarnar, sum slógvið verður goymt í, fyri 15 dollarar um dagin fyri hvønn.

– So tað sigur seg sjálvt, sigur hann, at tað verður til pengar. Sjálvandi standa ikki allir tangarnir alla tíðina, men tann, sum seinast verður tømdur, fer at kosta nógvar dollarar tilsamans.

IRF roknar við, at tann seinasti tangin er tømdur einaferð í oktober ella so. Og tá hevur brenningin tikið meira enn hálvtannað ár.

Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon, sigur, at teir hava roynt at sleppa av við hetta slógvið uttanlands. Men har verður sagt bums nei at taka ímóti.

Annars hava danir verið sera beinasamir, tá talan hevur verið um at tikið í móti slógvi. Teir hava eitt nú brúkt tað til at gera biogass av. Tó hevur her verið talan um slógv frá frískum fiski.

Men nú er sjúka staðfest, og so vilja teir ikki vera við, sigur Frímund Hansen.

Hann sigur, at tað fer heldur ikki at hjálpa, hóast nýggja avtalan við ES nú kemur í gildi.

Har er ein áseting um, at tað ber ikki til at flyta ímillum øki, har tað økið, flutt verður frá, er verri fyri við sjúkum, enn tað, flutt verður til. Og í hesum førinum hava vit sjúkuna í Føroyum.

Um støðuna á Fuglafirði í dag sigur Frímund Hansen, at teir hava síl í ringunum. Teimum bilar einki. Tað vóru síl í onkrum ringum, meðan laksurin eisini gekk har, og tey gjørdust ongantíð sjúk.

# Standa á berajólum

**Vit hava onga ætlan fyri, hvussu vit skulu bera okkum at, um ein størri vanlukka rakar føroysku alivinnuna, enn tann, sum rakti Alilaks í fjør**

TILBÚGVING
*Edvard Joensen*

400 tons av laskaslogvi standa á ellivta mánað og bíða eftir at verða koyrd burtur. Men tað er sera trupult, tí brennistøðin hjá IRF orkar ikki at brenna undan.

Varð sjúkan staðfest í einum øki, har alistøðirnar vóru tættari enn á Fuglafirði, stóðu vit rættiliga við skegginum í postkassanum.

Eingin ætlan er fyri, hvussu vit kunnu taka í móti tí sjúka fiskinum, tíansheldur at fáa hann burturbeindan.

Vestsalmon, sum eigur alistøðina á Fuglafirði, hevur sjálvt leigað tangar at koyra deyða fiskin í. Og tað var heldur einki lætt at finna eitt stað at seta teir á, sigur Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon.

Av Oljumálastýrinum, har umhvørvismál eisini verða umsitin, váttar Rókur Tummasarson, at eingin ætlan er fyri, hvussu vit skulu bera okkum at í slíkum førum. Og hann sigur eisini, at hann veit einki um, at nøkur slík er á veg heldur.

Um støðuna á Leirvíksvegnum í dag sigur hann, at hatta var bara ein neyðloysn, men váttar, at enn eru eingi útlit fyri eini endaligari loysn, um ein slík vanlukka, sum tann á Fuglafirði, rakar okkum aftur. Og tað kann jú verða nær sum helst.

Hann vísir annars til aðrar myndugleikar, sum kunnu taka sær av eini slíkari ætlan.

Sosialurin hevur roynt at fingið orð á landsdjóralæknan. Men tað eydnaðist ikki, áðrenn evstamark. Heldur ikki Eyðun Eltør, landsstýrismann við umhvørvismálum, ella Bjarna Djurholm, landsstýrismann við vinnumálum, eydnaðist at fáa orð á, áðrenn evstamark.

Ætlanin var at spyrja teir, hvat verður gjørt við málið, og um arbeitt verður við eini tilbúgvingarætlan.

Hinvegin upplýsir Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon, fyri Sosialinum, at vinnan sjálv er farin undir at finna eina skipan, sum kann loysa tann trupulleikan, sum verður, um slíkt hendir aftur.

Frímund Hansen situr sjálvur í ein um arbeiðsbólki, har millum aðrar alarar, fóðurframleiðarar og nevndin í Havbúnaðarfelagnum eru umboðað.

Bólkurin arbeiðir við at lýsa støðuna, kanna tørvin og fáa eina móttøku upp at standa, sum kann taka í móti sjúkum fiski, um soleiðis vil til einaferð aftur.

Eisini verður arbeitt við at finna fram til, hvat sjúkur fiskur møguliga kann brúkast til.

Tað er soleiðis, at sjúkan kann steriliserast, greiðir Frímund Hansen frá. Men tað er ein trupul prosess at fara ígjøgnum. Fiskurin skal hitast upp til 133 stig undir trýsti, sum skal vera 20 bar.

Frímund Hansen sigur, at hann regluliga kannar tangarnar á Leirvíksvegnum. Teir eru í góðum standi, sigur hann, og eingin vandi er fyri, at teir til dømis skulu fara at leka. Eisini eru teir væl merktir, soleiðs at teir ikki eru til ampa fyri ferðsluna á vegnum.

Men støðan er í dag tann, at Vestsalmon framvegis stendur einsamalt við allari ábyrgdini av teirri vanlukkuni, sum rakti alistøðina á Fuglafirði fyri næstan einum ári síðan.



*Alarar noyðast sjálvir at beina sjúkan fisk burtur, um ein vanlukka sum tann á Fuglafirði í fjør rakar alibrúkini*

*Tilvildarlig savnsmynd*



# Ebba Hentze heiðrað



*- Eg eri ógvuliga glað fyri heiðursbrævið, sum eg meti sum eitt herðaklapp, sigur Ebba Hentze*

**Eingin føroyingur hevur arbeitt meiri við at gera føroyskar bókmentir kendar uttanlands enn Ebba Hentze. Mentamálastýrið hevur heiðrað Ebbu Hentze við sømdargávu sum eina viðurkenning fyri týdningin, hon hevur fyri føroyska mentan og list**

*Turið Kjølbro*

Hon hevur altíð arbeitt fyri at gera føroyskar bókmentir kendar uttan fyri Føroyar, hevur týtt nógv stór føroysk verk til danskt, sjálv funnið áhugað forløg at gevi týðingar út, umframt týtt eina ørgrynnu av enskum, týskum, svenskum og norskum bókum til danskt. Seinasta verkið, hon hevur týtt úr føroyskum, er skaldsøgan hjá Oddvør Johansen, Í morgin er aftur ein dagur, ið er innstillað til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina. Millum avrikini teljast eisini fleiri barnabøkur, hon hevur skrivað. Nakað av tí mest hugtakandi og besta, ið er skrivað á donskum og føroyskum - bøkurnar um Antoniu.

Og loksins fær hon eitt herðaklapp. Í síðstu viku heiðraði landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, Ebbu Hentze við serstakari sømdargávu frá Mentamálastýrinum. Skipað varð í hesum sambandi fyri móttøku í Tinganesi, har landsstýrismaðurin í mentamálum, handaði henni heiðursbræv og sømdargávu. Í tøkum tíma, vilja nógv vera við, tí Ebba Hentze er ikki von at fáa herðaklapp í Føroyum.

Í heiðursbrævinum verður sagt, at sømdargávan verður latin í takksemi fyri hennara bókmentaligu avrik sum rithøvundur og sum týðari og sum ein viðurkenning av tí stóra týdningi, sum Ebba Hentze í virksemi sínum hevur havt fyri føroyska mentan og list eins og fyri føroyskar yrkjarar og rithøvundar.

- Eg eri ógvuliga glað fyri heiðursbrævið, sum er eitt herðaklapp fyri arbeiðið eg geri. Vit høvdu ein ógvuliga góðan dag, og nógv góð orð vórðu søgd, sigur Ebba Hentze í stuttari viðmerking.

Sum ung fór Ebba Hentze av landinum, og heimkomin aftur tók hon upp aftur bókmentaliga starv sítt. Millum annað hetta nam Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, við í røðu síni fyri Ebbu Hentze á móttøkuni.

- Tú fall væl til í heimlandinum aftur, og skjótt gjørdist tú ein eyðkendur partur av miðbýarmyndini - eitt sindur mystisk og loyndarfull, ein spennandi persónur, sum setti fantasiin í sving hjá Havnarfólki. Tú vann tær skjótt virðing millum tey, sum komu at kenna teg, fyri tína stóru vitan um samfelag, mentan og list, tín bókmentakunnleika og títt hvassa intellekt. Men við hvørt man tað hava verið trongt fyri andanum og so leitaði tú út í Verðina fyri at fáa luft. Eg vóni, at tú framvegis fer at vera

virkin innan tað øki, har tú hevur virkað alt títt lív, til gleði og gagn fyri øll, sum lesa bøkur og sum eru góðar við bókmentir.

# Autistaheimið endurreist



*Bústovnurin fyri autistar og menningartarnað er nú reistur aftur*

*Mynd: Eyðun Klakkstein*

**Arbeiðið at gera Autistaheimið í Klaksvík liðugt er seinkað nakrar mánaðir**

BÚSTOVNUR
*Turið Kjølbro*

Heldur tíðarætlanin stendur nýggi bústovnurin fyri autistar og menningartarnað í Klaksvík liðugur í september í ár. Arbeiðið er seinkað nakrar mánaðir, tí í heyst fóru húsini í eini ódn. Tey vóru tá akkurát reist. Allur viðurin varð oyðilagdur og nýggjur mátti bíleggjast. Byggiharrarnir hava nú bundið um heilan fingur og innilokað ta lonina, sum nú er reist aftur.

Húsini, sum standa beint við síðuna av Dáanum, ið er umlættingarheim fyri menningartarnað, verða góðar 500 fermetrar í tveimum lonum við millumbygningi. Onnur lonin verður til autistar og hin til menningartarnað. Í ovaru hædd vera 8 íbúðir, harav 4 íbúðir eru til autistar. Í millumbygninginum vera skrivstovur og annað. Ætlanin er seinni at innrætta tvær íbúðir til menningartarnað í kjallaranum, men enn er fígging ikki fingin til endamálið.

Bústovnurin, ið er ein landsstovnur, kostar um 7 mió. kr., tá innrættingin av kjallaranum ikki er tikin við. Peningur er settur av til endamálið í trimum løgtingsfíggjarætlanum.

- Vit hava bara merkt vælvild frá landsstýriskvinnuni í almanna- og heilsumálum viðvíkandi stovninum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Autistar í Norðoyggjum fingu fyri sløkum tveimum árum síðani eitt fyribils heim í einum fyrrverandi læknahúsum.

- Teimum dámar ógvuliga væl har, og gott er, at starvsfólkini hava nakrar royndir, áðrenn tey flyta í nýggja heimið, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Tørvur hevur leingi verið á bústovni fyri menningartarnað í Norðoyggjum. Kortini fáa ikki øll áhugað pláss, tá nýggi stovnurin letur upp.


